VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag og hósdagin:
Lítið lot av ymsum ættum. Skýggjað og fyri tað mesta turt. Hitin um 6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Hann frískar vindin av suðri. Skýggjað og helst turt. Hitin um 6 stig.



Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Hann veksur vindin til hvassan vind av landsynningi og eystri, í skiftum upp í skrið. Skýggjað við regni í skiftum. Hitin millum 5 og 8 stig.

Teir vildu ikki avstað aftur

Tónleikararnir í White Flag vildu ikki fara úr Føroyum sunnudagin, sum ætlanin annars var

TÓNLEIKUR
Eyðun Klakstein

Amerikumenninir vóru so hugtiknir av Føroyum, at teir bóðu fólkini í Grót, sum stóðu fyri Føroyaferðini, um at útseta fráferðina til mánadagin. Tað eydnaðist, og so kundu punkrockarar úr Los Angeles taka sær av løttum í Føroyum sunnudagin.

Tað passaði illa inn í skránna hjá White Flag at verða verandi í Føroyum ein dag afturat, tí mánakvøldið skuldu teir á pallin í týska býnum Münster, og ferðaætlanin gjørdist so knøpp, at tað var spurningur um teir kundu náa fram til tíðina. Tað var í øllum førum ikki tíð til nakra ljóðroynd, so teir máttu spáka beinleiðis inn á pallin.

Tónleikararnir í White Flag vóru alt annað enn smædnir, og teir krógvaðu seg ikki fyri fólki, meðan teir vóru í Føroyum.

Teir heilsaðu og tosaðu við øll, sum vildu í samband við teir, og á pallinum var tað eyðsýnt, hvørjum teir spældu fyri. Tað var ikki fyri sær sjálvum, men fyri fólkinum, sum stóð frammi við pallin.

Ungfólk yvirtóku pallin

Framførslan í Klaksvík var ótrúliga lívlig, og teir í White Flag hildu eftir konsertina fyri, at hatta var tann villasta framførslan, teir nakrantíð høvdu verið við til. Kanska var tað tí, at alt var á gosi, tá áhoyrararnir streymaðu upp á pallin móti endanum av konsertini. Tá kókaði yvir eina løtu.

– Vit eru sera væl nøgd við vitjanina av White Flag, og teir vóru eisini. Teir søgdu, at teir høvdu forelskað seg í landinum og fólkinum, og teir vildu avgjørt sleppa aftur hendan vegin at spæla, sigur Jón Tyril, formaður í Grót.

Eini 250 fólk vóru til konsertina í Klaksvík, og í Gøtu vóru stívliga 100 fólk og lurtaðu.

Tónleikararnir ræddust ikki føroysku áhoyrararnar, sum fyrst sluppu at standa heilt frammi við pallin og seinni eisini sluppu upp á pallin
Mynd: Tom Laursen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷12
Nuuk	÷7
Qaqortoq	0
Ammassalik	÷5
Saint John's	1
Halifax	0
Reykjavík	3
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	3
Lerwick	3
Aberdeen	3
London	6
Tromsø	1
Bergen	÷2
Oslo	–
Stokkhólm	0
Keypmannah.	0
Helsinki	÷8
Moskva	÷13
Berlin	0
Warzawa	÷8
Kiev	÷10
Bukarest	÷2
Paris	7
Madrid	7
Róm	12
Malorca	17
Athen	12
Malta	16
Tunis	17
Beijing	÷1
New Dehli	23
Bangkok	33
Jakarta	35
Sydney	–
New York	3
Miami	14
Los Angeles	16
Meksikobýur	19
Panama	30
La Paz	15
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	30

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýstøki sunnan fyri Føroyar fer spakuliga í ein landsynning.



Eitt djúpt lágtrýst sunnan fyri Grønland fer í ein landnyrðing og brúgvaløg haðani koma inn yvir Føroyar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 16/12 kl. 06⁰⁰– 17/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,9°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 6,0 mm – mált frá 16/12 kl. 06⁰⁰– 17/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 52,1 mm

www.sosialurin.fo

VESTFALLSKYRRINDI

11. des.: Fyrra kvarter
14. des.: Mánin longst frá jørðini
19. des.: Fullmáni

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
18. des.	05.19	17.41	04.19	16.41	04.34	16.56	07.19	19.41	08.19	20.41	03.34	15.56	02.34	14.56	05.34	17.56	06.34	18.56	05.04	17.26	06.19	18.41
19. des.	06.03	18.25	05.03	17.25	05.18	17.40	08.03	20.25	09.03	21.25	04.18	16.40	03.18	15.40	06.18	18.40	07.18	19.40	05.48	18.10	07.03	19.25
20. des.	06.48	19.12	05.48	18.12	06.03	18.27	08.48	21.12	09.48	22.12	05.03	17.27	04.03	16.27	07.03	19.27	08.03	20.27	06.33	18.57	07.48	20.12
21. des.	07.37	20.02	06.37	19.02	06.52	19.17	09.37	22.02	10.37	23.02	05.52	18.17	04.52	17.17	07.52	20.17	08.52	21.17	07.22	19.47	08.37	21.02

5 707265 100036 >